Á flot við Westward Ho

Kunning til lærarar og foreldur á Skálafjørðinum

Westward Ho

Av teimum gott hundrað sluppunum, sum í 1880-unum og 1890-unum vórðu keyptar úr Stóra Bretlandi til Føroya, eru bert tvær eftir. Onnur er Johanna TG 326 í Vági, og hin er Westward Ho TN 54. Báðar sluppirnar eru bygdar í Onglandi í 1884. Sí meiri um Westward Ho á: https://www.torshavn.fo/Default.aspx?pageid=1220.

Á flot við Westward Ho er eitt tilboð til allar 6.flokkar á Skálafjørðinum.
Fyri at gera tað so ómakaleyst sum gjørligt hjá lærarum og næmingum, ið fara túrin, eru skjøl um verklig viðurskifti o.a. gjørd teldutøk.

Kunning til foreldrini

Ymiskt tilfar er á heimasíðuni hjá Westward Ho um skipið. Sí https://www.torshavn.fo/Default.aspx?pageid=1220
Tit foreldur kunnu saman við barninum lesa um skipið og soleiðis fyrireika tað til fiskitúrin.
Foreldur eru sjálvandi vælkomin at taka lut saman við børnum á fiskitúrinum.

Náttúra & tøkni í 6. flokki

Ein fiskitúrur við Westward Ho kann fyrireikast í lærugreinini náttúra & tøkni. Eitt høvuðsevni, sum arbeiðast kann við í skúlanum, kundi t.d. verið „fiskur", „sjógvur", „matur úr sjónum" ella „sjótilfeingi".
Hin meiri verkligi parturin verður umborð á Westward Ho, og skuldi hetta gjørt undirvísingina í náttúru og tøkni meiri ítøkiliga og spennandi.

Fiskikapping

Fiskitúrurin er skipaður sum fiskikapping millum 6. flokkarnar á Skálafjørðinum.
Kappingin verður um mánaðrskiftið august/september 2019.
Hvør flokkur fær á leið tríggjar tímar at fiska í. Tann flokkur, sum fær flest fiskar, vinnur kappingina og fær vinnarasteyp til ognar.
Fiskur minni enn 25 cm. telur ikki við og verður tí settur út aftur.
Skiparin skal hava talið á fiskum, og eitt veiðuyvirlit verður síðani sent skúlunum.

Hvar?

Vit royna fiskimið og plinkar á nærleiðum. Tó er ongantíð meiri enn 30-40 minuttir at sigla aftur á Skálafjørðin.

Nær?
Fiskað verður 28., 29. og 30. august 2019.

Eru spurningar, ber til at ringja 555037, sum er telefonnummarið hjá Claus.

Á flot við Westward Ho		
Dato	Fyrrapart Kl. 07.45 – 12.00	Seinrapart Kl. 12.45 – 17.00
28/8	Skúlin við Løkin, 6a	Skúlin við løkin, 6.b
29/8	Stranda Skúli, 6fl	Skála Skúli, 6fl
30/8	Tofta Skúli, 6fl	Frískulin 6fl

Um veðrið ikki verður til vildar, tann dagin farast skal avstað, gevur samskiparin læraranum boð um hetta í seinasta lagi kvøldið fyri um 20-tíðina, so næmingar og foreldur kunnu fáa boð um útsetanina umvegis telefonketuna hjá flokkinum. Síðani verður nýggj tíð avtalað.

Um ætlaði túrurin verður avlýst, sendir lærarin heiminum boð um, nær farið verður avstað seinni,.

Hvussu verður veðrið?
http://theyr.tv/cg/cny
www.yr.no/sted/Færøyene

Trygd
Allir næmingar **skulu** vera í flótivesti, tá ið teir eru umborð á Westward Ho.
Áðrenn loyst verður, og meðan siglt verður út á fiskimið, fáa næmingar, lærarar og foreldur kunning um trygdina umborð, og hvørjar skipanir og mannagondir eru, um eitthvørt óvanligt hendir. Kunningin tekur uml. 10 min..
Næmingar og foreldur eru fevnd av tryggingini hjá sluppini.

Gjald
Fiskitúrurin kostar kr. 5.000 fyri hvønn 6. flokk. Skúlin rindar gjaldið við at flyta peningin á kontu 6460 – 172.136.6 i BANKNORDIK.

Luttakaralisti
Fullfíggjaður navnalisti við øllum luttakarum skal flýggjast skiparanum, áðrenn loyst verður. Luttakaralisti at fylla út, verður sent skúlunum.

Toskatalvan
Talvan er hent at brúka bæði í undirvísingini og umborð, tá ið blóðgað og kruvt verður.

Fiskatalvan
Talvan er hent at brúka bæði í undirvísingini og umborð.

Tráður
Umborð á sluppini eru 12 góðar fiskiklárar tráður. Tað ber bert til at nýta 12 tráður í senn. Hetta fyri at umganga, at fløkja kemur í.
Vanligt er, at tveir næmingar eru um hvørja tráðu.

Pilkar
Nýtslan av pilkum kann gerast rættiliga stór, um ikki rætt verður atborið.

Matur og drekka
Næmingarnir kunnu hava matpakka og okkurt drekkandi við. Tað ber ikki til at kóka ella hita nakað umborð. Skaffigreiðir eru umborð.

Gott at taka við
- Knív
- Kikara
- Fototól

Heimkunnleika
Verður væl fiskað, ber til at nýta fiskarnar í heimkunnleika til onkran lættan fiskirætt, men næmingarnir kunnu sjálvandi eisini taka fongin við til húsa.

Vinningar

Borg fer í september mánaði at handa tí flokkinum, sum hevur fingið flest fiskar, steyp.

Berglon fer í september mánaði at handa næminginum, ið hevur fingið størsta fiskin, eina tráðu.

Vinarliga vegna Westard Ho
Claus Reistrup